**VINNUSÍÐURNAR**
BLAÐIÐ við føroysku VINNU tíðindunum



Indiska familjan úr Tamil Nadu, sum gjørdust føroyingar. Maður og sonur errin av, at kona og móður fekk prógv

Mynd Jan Müller



Mynd Jan Müller



*Stjórin á Føroya Handilsskúla, BP-stórin og vararektarin á Robert Gordon University, sum hava verið undangongufólk fyri at fáa nýggja tiltakið at eydnast. Her gleðast tey saman við næmingum og familjum teirra til hátíðarhaldið í Føroya Telebygninginum*

Mynd Jan Müller

fegin um, at vit hava verið við til at stuðla samstarvið millum føroyskan og skotskan útbúgvingarstovn, og vil eg eisini nýta høvið til at takka Graeme Slaven frá Robert Gordon Universiteti og Elsu Mariu Holm Olsen og fyrrverandi stjóranum Ragnari Magnussen frá Føroya Handilsskúla fyri eitt sera gott samstarv.

Vit, ið hava verið við til at leggja próvhandanina til rættis, takka Føroya Tele fyri, at vit fingu loyvi til at nýta tykkara stásiliga bygning til hesa hátíðarløtu. Jú, her er høgt til loft, og her er vítt til veggja, sum skaldið Hans Andrias Djurhuus málbar seg í síni yrking, tá Sjónleikarhúsið í 1926 varð vígt og sum eisini bleiv tikið til, tá hesin bygningur varð tikin í nýtslu.

Ynski fegin øllum tykkum, ið fingu prógv handað í dag til lukku við hesum stóra degi tykkara, og vónandi verður tann kunnleikin, ið tit hava nomið hesi lestrarárini til gleði og gagn bæði fyri tykkum og tað samfelag, tit liva og virka í.

Fari at enda við hesum orðum: "Ynski um menning og framburð býr í okkum menniskjum. Framburður er eitt mál, ið vit vanliga seta í samband við okkara dagliga yrki. Útbúgving gevur okkum dugnaskap, førleika og vitan, og styrkir og mennir okkara støði til framburð og til at náa høgum málum."



*Mong fegin andlit í tí vakra og sigandi umhvørvinum í glasbygninginum hjá Føroya Telé leygardagin*

Mynd Jan Müller


